Dagf. 1. juni 2022
HMR j. nr. 22/10070-5

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-192/2021 eftir § 52 a) í tingskipanini um endurvenjingar, frá Helga Abrahamsen, løgtingsmanni

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvør er orsøkin til, at fólk, ið fáa skurðviðgerð aðrastaðni enn í føroyska heilsuverkinum, missa rættin til endurvenjing í heilsuverkinum?

Svar:

Til spurning 1
Í løtuni er tað soleiðis, at tað er ein ávís bíðitíð til skurðviðgerðir í Sjúkrahúsverkinum. Tí velja nøkur, sum hava privata trygging, at fara aðrastaðnis til skurðviðgerð, har bíðitíðin er styttri. Í mun til privata viðgerð koma fleiri afturvendandi spurningar. Sjúkrahúsverkið upplivir m.a., at sjúklingar ynskja viðtalu í Sjúkrahúsverkinum, har tey fáa kunning um skurðviðgerðina, áðrenn tey velja skurðviðgerð í privata geiranum. Somuleiðis vilja sjúklingar fegnir sleppa til t.d. endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum eftir viðgerð í privata geiranum.

Í mun til endurvenjing bjóða privatar tryggingar eisini endurvenjing, um hetta verður mett neyðugt (sí t.d. Mølholm Forsikring: Forsikringsbetingelser).

"§ 7.8 Genoptræning: § 7.8.1 Hvis der er foretaget behandling (operation) ambulant eller under indlæggelse på privathospital, dækker behandlingsforsikringen forsikredes udgifter til nødvendig genoptræning. Genoptræningen skal godkendes af Mølholm Forsikring A/S. Genoptræningen godkendes for en 3 måneders periode første gang, herefter skal der ansøges om yderligere 3 måneder pr. telefon. Er der efter 6 måneder stadig brug for genoptræning, skal der udfyldes ny skadeanmeldelse med en vurdering fra speciallæge eller egen læge. Dette for at afdække, om forløbet forløber planmæssigt, eller om den forsikrede atter skal ses af en speciallæge. Forsikredes udgifter til nødvendig genoptræning hos fysioterapeut og kiropraktor er dækket indtil behandlingen er afsluttet over for Mølholm Forsikring A/S. Genoptræningen skal ordineres af speciallæge."

Flestu hava møguleikan at fáa endurvenjingina frá privatari klinikk við ávísing frá kommunulækna. Um tað er ein serliga kompliserað endurvenjing, sum krevst, ella endurvenjing, sum ikki finnist í privatum geranum, kann kommunulæknin senda ávísing til Sjúkrahúsverkið um at lyfta uppgávuna.

Heilsumálaráðið, 1. juni 2022

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður